# Áleypari royndarvenur í B36

**B36 hevur leingi leitað eftir einum áleypara, og nú er ein brasiliumaður komin at royndarevenja í árstalsfelagnum**

ROYNDARVENJING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er eingin loyna, at tað serliga er á álopssíðuni, at hópurin hjá B36 er tunnur, og at felagið leingi hevur leitað eftir einum typiskum málskjútta til at bøta um støðuna. Nú er brasiliumaðurin Wellington komin at royndarvenja.

### Vil fegin til Føroya

Wellington er ikki heilt ókendur í Føroyum. Hann hevur áður leikt við FS Vágum, og sum skilst hevur brasiliumaðurin eitt stórt ynski um at sleppa aftur at spæla fótbólt í Føroyum.

Í B36 hava tey enn ikki tikið støðu til, um Wellington skal fáa sáttmála við felagið. Í fyrstu atløgu royndarvenur álopsmaðurin við felagnum í eina viku, áðrenn støða verður tikin til, um brasiliumaðurin skal verða ein partur av fyrstaliðshópinum hjá B36.

Annars fegnast tey í árstalsfelagnum um, at nýggi suðurafrikanski spælarin hjá teimum, Obi, nú hevur fingið øll pappírini upp á pláss, so at hann kann verða við í dystinum í Formuladeildini komandi vikuskifti.

## VÍF vann á strandakvinnum

Ein dystur í Sunset-kappingini var leiktur í Vestmanna týskvøldið.

Dysturin var millum VÍF og StÍF, og vestmannakvinnur vunnu dystin 25-18.

Hálvleiksstøðan var 13-10 til VÍF.

Ioana Rapa var besti málskjútti hjá heimaliðnum við 12 málum, meðan Poula Olsen skeyt 5 mál fyri StÍF.

**tn**

SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 8 | 8 - 0 - 0 | 715 | 438 | 277 | 29 |
| 2 Stjørnan | 9 | 8 - 0 - 1 | 656 | 445 | 211 | 29 |
| 3 Neistin | 8 | 5 - 0 - 3 | 619 | 471 | 148 | 20 |
| 4 Søljan | 9 | 4 - 0 - 5 | 614 | 542 | 72 | 16 |
| 5 VÍF | 8 | 4 - 0 - 4 | 521 | 503 | 18 | 13 |
| 6 Kyndil | 8 | 3 - 0 - 5 | 441 | 588 | -147 | 9 |
| 7 StÍF | 8 | 1 - 0 - 7 | 475 | 601 | -126 | 7 |
| 8 Tjaldur | 8 | 0 - 0 - 8 | 314 | 767 | -453 | 0 |

Søljan-Stjørnan 23-31(14-19)

# Rokdystur á Giljanesi

**Talan var um ein rættuligan rokdyst, tá ið Søljan og Stjørnan hittust á Giljanesi mikukvøldið**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Talan var um ein rættuliga rokutan dyst, tá ið bestu kvinnuliðini hjá Søljuni og Stjørnuni brustu saman á Giljanesi mikukvøldið. Ikki tí, Stjørnan hevði munin at kalla allan dystin, og sigurin hjá klaksvíkskvinnum var ongantíð í vanda.

### Hótti við at taka liðið av vøllinum

Tað vóru serliga tær í Stjørnuni, sum vildu verða við, at heimaliðið fekk loyvi til at spæla alt ov hart. Venjarin hjá Stjørnuni, Rógvi Nielsen, sigur, at eftir hansara tykki var talan um ein ómetaliga hart leiktan dyst, har tað uttan nakað kundi verið givin eini 5 ella 6 reyð kort.

- Fyri mær tykist tað sum um, at nú FM er avgjørt, so eru dómararnir farnir í summarfrí. Vit vilja tó framvegis betra okkum, og hóast vit ikki gerast meistarar, so ætla vit okkum at tapa meistaraheitið við maner, sigur Rógvi Nielsen.

- Í nógvum førum var talan um veruligan bardaga úti á vøllinum, uttan at tað fekk nakrar avleiðingar, sigur venjarin hjá Stjørnuni.

Eftir ein tilburð í seinna hálvleiki, har ein av leikarum hjá Stjørnuni meiddi seg eitt sindur, segði Rógvi Nielsen við dómararnar báðar, at um hetta ikki bleiv steðgað, so fór hann at taka liðið hjá sær av vøllinum.

- Eg hótti við at taka liðið av vøllinum, tí eg stúrdi fyri heilsustøðuni hjá mínum leikarum. Søljan fekk loyvi til at spæla so mikið hart, at tað var vandi fyri, at spælararnir hjá okkum fingu álvarsligar skaðar, um dómararnir ikki steðgaðu harða spælinum, sigur Rógvi Nielsen.

### Stjørnuleikari meldaður til kappingarnevndina

Eingi reyð kort vóru tó havd á lofti, men eftir at dysturin var lokin var ein tilburður, sum hevur við sær, at ein av leikarunum hjá Stjørnuni er meldaður til kappingarnevndina. Sambært øðrum dómaranum, Dánjal Samuelsen, snýr tað seg um, at viðkomandi spælari kropsliga gjørdi seg inn á ein av leikarunum hjá Søljuni, og harumframt munnliga hótti leikaran hjá Søljuni.

Kappingarnevndin hjá HSF skal nú taka støðu til málið, og tað man verða lítið at ivast í, at viðkomandi leikari kann vænta sær leikbann í nakrar dystir.

**Søljan-Stjørnan 23-31(14-19)**

**Søljan:** Lina Andriulyte 5(1), Hertha J. Simonsen 4, Heidi Maria Akselsen 3, Sólja Jóanisdóttir 3(1), Fía Selma Nielsen 2, Kristianna Petersen 2, Nicoleta Radu Hansen 2, Arnleyg Haraldsen 2

**Stjørnan:** Alina Olaru 7(4), Anna Kristian Samson 6, Una Olsen 5, Bára Skaale Klakstein 5, Katarina Stjepanov 5, Joan M. Djordjevic 2, Annika Ljósstein 1

**Brotskøst:** Søljan 2(2), Stjørnan 4(4)

**Útvísingar:** Søljan 4, Stjørnan 2

**Dómarar:** Kristian Johansen og Dánjal Samuelsen

**Áskoðarar:** 59

# Stjørnan og HSF hvør sítt



*Venjarin hjá Stjørnuni, Rógvi Nielsen, heldur tað verða blóðskeivt av dómarunum, at blanda hansara leiklut sum venjara hjá Stjørnuni saman við leiklutin, ið hann hevur í HSF*
*Savnsmynd*

**Undir dystinum millum Søljuna og Stjørnuna mikukvøldið hótti Rógvi Nielsen við at taka liðið hjá sær av vøllinum. Hetta fekk annan av dómarunum at siga, at Rógvi ikki skuldi misnýta sína makt innan HSF**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað fekk bikarið at flóta yvir hjá Rógva Nielsen, tá ið Una Olsen miðskeiðis í seinna hálvleik var tikin heldur harðliga í verjuni hjá Søljuni. Venjarin hjá Stjørnuni hótti við at taka liðið av vøllinum, um dómararnir ikki steðgaðu harða spælinum. Men Rógvi fekk at vita frá øðrum dómaranum, at hann ikki skuldi misnýta sína makt innan HSF til at hótta dómararnar.

### Tað er hvør sítt

Dómarin, Dánjal Samuelsen, sigur, at Rógvi Nielsen segði við seg, at um leikarin hjá Søljuni, ið hevði havt nærdyst við Unu Olsen, ikki bleiv revsaður, so tók hann liðið av vøllinum.

Hetta fekk Dánjal Samuelsen til at siga við Rógva, at hann ikki skuldi misnýta sína positión innan hondbóltssambandið til at hótta dómararnar við at taka liðið av vøllinum.

- Atburðurin hjá Rógva Nielsen og fleiri av leikarunum hjá Stjørnuni var stak vánaligur undir dystinum, og Rógvi má minnast til, at hann er ein partur av starvsnevndini í HSF, sigur Dánjal Samuelsen.

Men Rógvi Nielsen er rúkandi ósamdur í hesum. - Tað er rætt, at eg hótti við at taka liðið av vøllinum, men tað er blóðskeivt at blanda mín leiklut sum venjara hjá Stjørnuni saman við mín leiklut innan hondbóltssambandið, tí tað hevur einki við hvørt annað at gera, sigur Rógvi Nielsen, sum situr í starvsnevndini í HSF og eisini er venjari hjá kvinnulandsliðnum.